

# Skrivstovufólk

Orsakað av vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki at hjálpa okkum í bókhaldinum. Talan er um eitt hálvtíðar starv (arbeiðstíðin kann avtalast).

**Starvið**
Arbeiðsuppgávan verður í høvuðsheitum:
Alt vanligt skrivstovuarbeiði, tó er ætlanin at tú serliga skal taka tær av tollavgreiðslu og fakturering.

**Umsøkjarin**
Vit vænta at tú hevur skrivstovuútbúgving ella hollan kunnleika innan bókhald.
Kunnleika til tollavgreiðslur.
Ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og ert røkin.
Kunnleiki innan HVS er ein fyrimunur (tó eingin treyt).

Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsing um royndir og útbúgving skal sendast til P/F Demich, Postboks 378, FO-110 Tórshavn, skjótast til ber ella í seinasta lagi 22. juli 2002.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torbjørn Hansen ella Jan Günther á telefon 311071.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3379
**Navn:** Sp/f H.J.H. Bygging
**Adressa:** 655 Nes, Eysturoy
**Kommuna:** Nes Kommuna
**Stovningardato:** 20.06.2002
**Viðtøkudato:** 20.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 232.000,00
**Inngjaldingarháttur: :** Kr. 232.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Hans Jákup Hansen, 655 Nes, Eysturoy.
**Stjórn:** Hans Jákup Hansen, 655 Nes, Eysturoy.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka byggivinnu, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

***Skráseting Føroya tann 24. juni 2002***

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3381
**Navn:** Sp/f Ósin
**Adressa:** 530 Fuglafjørður
**Kommuna:** Fuglafjarðar Kommuna
**Stovningardato:** 20.06.2002
**Viðtøkudato:** 20.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 197.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 197.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Margeir Toftegaard, 530 Fuglafjørður.
**Stjórn:** Margeir Toftegaard, 530 Fuglafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil, ídnað ella aðra vinnu í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

***Skráseting Føroya tann 24. juni 2002***

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3385
**Navn:** Sp/f Freiða
**Adressa:** 470 Eiði
**Kommuna:** Eiðis Kommuna
**Stovningardato:** 24.06.2002
**Viðtøkudato:** 24.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Mortan Aksel Mortensen, 470 Eiði og Sonni Kallsoy, 470 Eiði.
**Nevnd:** Mortan Aksel Mortensen, 470 Eiði (formaður), Sonni Kallsoy, 470 Eiði og Katrin Haraldsen, 470 Eiði.
**Stjórn:** Katrin Haraldsen, 470 Eiði.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum ella nevndarformanninum.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 24.06.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fisivinnu, ídnað, handil o.a. í hesum sambandi.

***Skráseting Føroya tann 26. juni 2002***

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3389
**Navn:** Sp/f Tváttá
**Adressa:** Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 26.06.2002
**Viðtøkudato:** 26.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 257.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 257.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Torfinn Johansen, Toftagervej 25, DK-9850 Hirtshals
**Stjórn:** Torfinn Johansen, Toftagervej 25, DK-9850 Hirtshals
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum
**Grannskoðari:** KPMG Sp/f, Staravegur 17, 100 Tórshavn
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 26.06.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at gera íløgur í fiskivinnu og hava annað virksemi í hesum sambandi.

***Skráseting Føroya tann 26. juni 2002***

*Kristin Balle*








LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starvslesandi í Brússel

**(Stagiaire)**

Søkt verður eftir lesandi til Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum. Starvstíðin er sett til at verða frá 1. september 2002 til 1. februar 2003 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni í samskiftinum við Evropasamveldið við serligum atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á bachelor stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Brússel, sum er ein samrunnin partur av Løgmansskrivstovuni - uttanríksdeildini.

**Setanartreytir**
Starvið verður skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum. Starvið er ólønt, men viðbót verður latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Nærri upplýsingar eru at fáa við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, tlf. +298 35 10 10.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
**Tinganes**
**FO-100 Tórshavn**
Telefax +298 35 10 15
E-mail: info@tinganes.fo

og skulu verða á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi mikudagin 17. juli 2002.


Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Sosialurin - 311820



Skjót levering
Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN



máling & gólv
NAIRN VINYLGÓLV
CLASSIC
* Slitsterkt vinyl
* Stórt úrval
* TILBOÐ:
Ókeypis álagt
4 m breitt:
380kr.
meturin
máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066

Sosialurin


# TEKNIKARI

Til styrkjan av prosjekt- og viðlíkahaldsdeild okkara, verður søkt eftir einum teknikara.

| | |
|---|---|
| **Starvið:** | Starvið fevnir um planlegging og útinnan av prosjektum og alt viðlíkahald í samstarvi við verandi manning á deildini. Talan er sostatt um røkt av allari útgerð okkara, m.a. á servicustøðum, goymslum og tangabilum. Arbeiðsøkið er kring allar Føroyar, men arbeiðsmiðdepilin er Tórshavn. |
| **Útbúgving:** | Tú skalt helst vera handverkari. Hevur tú harumframt tøknfrøðiliga útbúgving innan maskin- og el-tøkni, gevur hetta fyrimun. Dentur verður eisini lagdur á góð samstarvsevni, og at tú er hugaður at veita góða tænastu. |
| **Vit bjóða tær:** | Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Løn eftir avtalu í samsvari við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan. |
| **Umsókn:** | Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14.08.2002. Nærri upplýsingar kunnu fást við at venda sær til Heina í Buð leiðara á telefon nr. 34 74 00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. |

Shell
**P/F Føroya Shell**
Viðarnes • Postbox 188 • 110 Tórshavn
Tel: 34 74 00 • Fax: 34 74 90 • e-mail: shell@shell.fo
www.shell.fo

INPACT INTERNATIONAL

# Summarfrí

Vit fara í summarfrí tann 8. juli og koma aftur beint eftir ólavsøku. Tí verður skrivstovan stongd í hesum tíðarskeiði.

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn
telefon: 31 47 00; telefax 31 38 15
t-postur: inpact@post.olivant.fo

**Member of international network of professional accountants**

# Til sølu

Grillvognur á keiini í Klaksvík til sølu, um nóg høgt boð fæst.

**Árni Müller**
**tlf. 265904**

# Miðvágs-Sandavágs skúli

Søkt verður eftir tveimum vikarum vegna lærarar í barnsburðarfarloyvi.

**Starv 1:** Er 21 tímar um vikuna frá 19. august 2002 og 30 vikur fram. Viðkomandi skal, umframt at verða flokslærari í 7. fl., eisini undirvísa í føroyskum, landalæru og tilevning í 7. fl., enskum í 6. fl. og tilevning í 3. flokki.

**Starv 2:** Er 26 tímar um vikuna frá uml. 26 august 2002 og 24 vikur fram. Viðkomandi skal undirvísa í hondarbeiði í 10. fl., lívfrøði og landalæru í 8. fl., enskum og lívfrøði í 7. fl., náttúru og tøkni, tilevning og ítrótti í 5. fl. og hondarbeiði og ítrótti í 4. fl.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast frá skúlastjóranum á tlf. 332318 ella 218820.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi innan 10. juli 2002.

**Skúlastýrið við Miðvágs-Sandavágs skúla**
v/ Gitte Samuelsen
360 Sandavágur

Sosialurin -tað loysir seg